## Gransking á Fiskaaling komandi árini

**Aling á landi**

Alingin á landi hevur ment seg nógv seinastu tíðina, og Føroyar eru á odda, tá talan er um aling av stórum smolti. At ala stórar nøgdir av góðum og stórum smolti á landi í stórum kørum, setir høg krøv til vatngóðskuna og umhvørvið, sum fiskurin veksur í.



Fiskaaling fer at menna vitan um vatngóðsku í føroyskum RAS-skipanum, og gera ein myndil til at kanna rákið í alikørunum.

Menningin hjá laksinum verður sett í samband við vatngóðskuna, og Fiskaaling fer millum annað at kanna sambandið millum vatngóðsku, smoltifisering og trivnaðin hjá fiskinum.